







# Cippo
# DREKK ALT TÚ KANST

Í Cippo ber hvørt fríggjakvøld til at keypa eitt atgongumerki og síðan at drekka so galið ein ynskir í barrini. Men tað er ein fyrimunur at vera kvinna hetta kvøldið.

NÁTTARLÍV

**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**

Á plakátini hjá Cippo stendur skrivað, at atgongumerki kostar 50 kr. Men síðan er ein ávísing oman í horni á plakátini, har tað stendur at lesa, at bert kvinnur sleppa inn fyri 50 kr, meðan menn mugu taka til takkar við at gjalda 295 kr. fyri at sleppa inn – altso heili 245 kr. meira enn kvinnur.

- Tað er eingin loyna, at menn drekka fleiri ferðir meira enn kvinnur, tá teir eru í býnum. Kvinnur keypa flest allar bert onkran sterkan drykk – piña colada, ísbjørn og tílíkt, meðan menn keypa alt, teir hava ráð til ella fáa fatur á. Um tað hevði kostað tað sama fyri menn og kvinnur at sleppa inn, hevði tiltakið givið undirskot, sigur Rúni Djurhuus, ánari av Cippo.

Ofta tá lýst verður við fríari barr, eru tað ofta bert ávísir drykkir, ið eru ókeypis. Men Rúni Djurhuus váttar, at soleiðis er støðan ikki í Cippo:

***- Alt í barrini er ókeypis uttan 'skotini', ið kosta 10 kr. Annars kunnu øll, ið hava keypt atgongumerki, drekka alt, teimum lystir.***

Rúni Djurhuus sigur, endamálið við tiltakinum fyrst og fremst er at royna okkurt nýtt, men somuleiðis at geva øllum møguleika at fara í býin uttan at gjalda alla verðina:

***- Hetta er ein bíligur máti at fara í býin á. Øll vita frammanundan, hvat tað kostar at koma inn og síðan at fáa alt at drekka, teimum lystir. Tískil nýtast tey ikki at hava meira pening við í býin.***

Rúni Djurhuus leggur at enda afturat, at undirtøkan fyri tiltakinum hevur verið góð, og at Cippo ætlar at halda á fram við tiltakinum komandi fríggjakvøldini.



**Frozen Blue Daquiri**
*4 cl Rose's Blue Curaqao*
*2 cl Rose's Lime*
*4 tesk av sukri*
*Ískubbar*

***Leiðbeining:***
*- Morla ískubbarnar í eini hvirlu og blanda alt tilfarið saman. Koyr í eitt glas og pynta eitt nú við lime og súgvirøri.*



**Kári Horn:**
Eg brúki meira pengar, tá eg eri í býnum, enn tær 295 krónurnar atgongumerki kostar. So í roynd og veru spari eg pengar, tá eg fari í Cippo fríggjakvøld.
Fyrstu ferð eg var til tiltakið, var stúgvandi fult av fólki, og tað var rættiliga stuttligt, men næstu ferð vóru ógvuliga fá. So haldi, tiltakið ikki burdi verið hvørt fríggjakvøld, men heldur eini 4-5 ferðir um árið, tí so hevði tað verið stuttligari. Eg haldi heldur ikki, tað er órættvíst, at tað kostar meira fyri menn enn fyri kvinnur. Kvinnur drekka nógv minni enn menn, og á henda hátt koma eisini fleiri kvinnur í býin fríggjakvøld.



**Rudi Rasmussen:**
Hetta tiltakið er eitt gott hugskot. Eg keypi sjáldan í barrini, um tað ikki er ókeypis. Men tað er undarligt, at dreingir skulu gjalda meira enn gentur – prísurin áttu at verið líka fyri øll. Eg haldi avgjørt ikki, at dreingir drekka so nógv meira enn vit. Tað sást eisini aftur í Cippo fríggjakvøldið, at atgongumerkini vóru bíligari hjá gentum, tí nógv fleiri gentur vóru komnar, og tað var trupult at sleppa framat barrini. Annars hevði tað verið stuttligari, um tiltakið ikki var hvørt fríggjakvøld, men heldur av og á.



**Sæbjørn Ennislíð:**
Tiltakið er eitt gott hugskot. Eg hevði brúkt hasar 295 kr, ið atgonumerki kostar, sjálvt um eg hevði farið onkra aðrastaðni. Tað er eisini frálíkt, at vit sleppa at drekka alt, vit hava hug til. Og tað er avgjørt ikki órættvíst, at atgongumerkini kosta meira hjá monnum enn kvinnum. Menn skulu vanliga hava nógv meira at drekka enn kvinnur, áðrenn teir kenna rús á sær.